# Ljóst og hugnaligt

Gisla Poulsen, sum starvast í vøggustovu, og Christian Eli, sum siglir við grønlendskum rækjutrolara, búgva uppi Millum Gilja í Hoyvík. Tey eiga tvær døtur, Rannvá og Gurðið. Tey lótu húsini byggja í 1988, og var tað arkitekturin Hannis Egholm, sum teknaði tey.

**Tekst:** Rigmor Dam
**Myndir:** Álvur Haraldsen


Gisla, Christian Eli og Guðrið framman fyri húsini millum Gilja.

» Mær dámar væl at seta lutir saman, eitt nú gamalt og nýtt, sum í fyrsta umfari tykjast óhóskandi, men sum kortini taka seg væl út saman.

Húsini eru funktionell, ljós og stílfull, og samstundis eru tey sera persónlig. Í erva er stovan, haðani til ber at hyggja oman í køkin. Í miðhæddini eru køkur og spísikøkur út í eitt, og inn frá køkinum eru arbeiðsrúm og sjónvarpsrúm. Í erva og á miðhæddini er opið upp í tróðrið, og nógvu høgu vindeyguni lýsa rúmini upp. Í neðra eru kømur og bað.

Gisla og Christian Eli siga, at tey tíbetur eru samd, tá um ræður húsini. Men at Gisla brúkar meira tíð uppá at pynta og at gera tað heimligt.

– Eg haldi tað er so synd í monnum, sum búgva í einum dukkuhúsi. Tí vóni eg, at tað sæst, at vit eru tvey kyn, sigur Gisla.

Fyri Gislu og Christian Eli hevur tað størstan týdning, at húsini eru hugnalig.

– Tá opið er upp í tróðrið er vandi fyri at tað verður ov opið og stórt inni, sigur hon. Og hon greiðir frá, at henni dámar væl at ganga á loppumarknaði og at finna stuttligir lutir, sum hóska til húsið. Og so dámar henni væl at seta lutir saman, eitt nú gamalt og nýtt, sum í fyrsta umfari tykjast óhóskandi, men sum kortini taka seg væl út saman.

Gisla og Christian Eli siga, at teimum dámar væl reinar linjur og ein klassiskan stíl við sniðgivnum innbúgvi, sett saman við persónligum lutum. Og so elska tey Ikea.



Gisla er ov høg til køksborðið. Tí fekk hon ein snikkara at gera sær eitt stórt skeribretti, sum hon brúkar hvønn dag. Í kókinisjuni hava tey bæði vanligar plátur og gass.


Reinar linjur ganga aftur í húsinum, sum kortini er heitt og hugnaligt.


Ljósabláa 50'ara kannan er hægsti retromóti. Gisla fekk hana frá onkrum, sum ikki skoytti um hana.